# Eru ongan veg komnir

**Nú er rættilig gongd komin á samráðingarnar ímillum arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnar um nýggjan sáttmála**

SAMRÁÐINGAR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er rættilig gongd komin á sáttmálasamráðingarnar á privata arbeiðsmarknaðinum.

Fyrsti fundurin ímillum arbeiðsgevarafeløgini og arbeiðarafeløgini var seinasta mánadag, tá ið partarnir hvør í sínum lagi løgdu krøvini fram.

Men mánadagin byrjaðu so samráðingarnar av álvara og partarnir møttust aftur í gjáramorgunin.

Og nú er líkt til at samráðingar verða hvønn dag til, liðugt er.

Tað er avtalað, at ongin skal siga nakað um krøvini, sum sett eru fram, men tað skilst á samráðingarfólki, at talan er bæði um lønarkrøv og um aðrar broytingar í sáttmálanum.

Arbeiðarafeløgini halda, at talan er um sámulig krøv, men arbeiðsgevararnir vísa nógvum av teimum afturso tað er alt sum tað plagar at vera.



*– Arbeiðarafeløg og arbeiðsgevarar eru farnir undir samráðingarnar av álvara. úrslitið fáa vit í seinast lagi at vita tá ið ein vika er farin av mai mánaði*

Sum vanligt eru partarnir púra ongan veg komnir, so tíðliga í samráðingunum.

Tað er ikki fyrrenn heilt fram ímóti evstamarki, at glið kemur á – um tað yvirhøvur kemur glið, tí tað ger tað verri enn so altíð.

Tað vanliga er, at semingsmenninir mugu uppí, men báðu tær seinastu ferðina eydnaðist tað heldur ikki teimum at fáa partarnar at semjast fyrrenn arbeiðssteðgur hevði verið í nakrar vikur.

Tað eru tey fýra arbeiðarafeløgini, Føroya Arbeiðarafelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag og arbeiðsmenninir og arbeiðskvinnurnar í Havn, sum samráðast í felag við arbeiðsgevararnar.

Sáttmálin gongur út 30. apríl. Men eydnast ikki at finna semju so at semingsmaður má uppí, hevur hann heimild at útseta eitt møguligt verkfall í eina viku og tað plagar hann at gera.

Fimta arbeiðarafelagið í landinum, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, hevur ikki sagt sáttmálan upp.

## Malan Marnersdóttir heldur flaggrøðuna í Havn

FLAGGDAGSHALD

Flaggdagin 25. apríl skipar Havnar Hornorkestur sum vant fyri flaggdagshaldi í Havn.

Klokkan 15 fer skrúðgonga við Havnar Hornorkestri og skótum úr nýggja kommunuskúlagarði oman á Vaglið, har Malan Marnersdóttur flytur fram røðu.

Tann 13. februar fyri tveimum árum síðani gjørdist Havnar Hornorkestur 100 ár, og tann 13. ferbruar í ár hevði Gunnar Mikkelsen verðið 100 ár.

Gunnar og Havnar Hornorkestur hava ikki bara felags føðingardag og næstan sama aldur, tí longu í 1918 gjørdist Gunnar limur í Havnar Hornorkestri, har hann gjøgnum árini m. a. hevur stjórnað orkestrinum, verið formaður og seinni eisini gjørdist heiðurslimur.

Vit kenna øll Gunnar sum tónaskald. Hann hevur skrivað løg til fleiri kendar føroyskar sangir, nevnast kunnu »Várt land er alfagurt«, »Enn minnist meg tey høgu fjøll« og ikki minst »Dýrd á vík og vág«.

Gunnar hevur eisini skrivað lag til flaggsangin »Sjá tú blánar«, sum Havnar Hornorkestur, umframt vanliga svenska lagið, spælir á hvørjum ári til flaggdagshaldið.

Í samband við at Gunnar Mikkelsen í ár hevði verið 100 ár, ætlar Havnar Hornorkestur at spæla nøkur av hansara løgum eftir sjálvt flaggdagshaldið.

# Suðuroy og mentanin á breddan

**Leygardagin fór stórt tiltak fram í Trongisvági við tónleiki og røðum, har Suðuroyggin, mentanin og framtíðin varð sett á breddan**

MENTAN

*aki@sosialurin.fo*

Leygardagin fór tiltak fram í Trongisvági, ið nevndist »Suðuroyggin og mentanin – um 2 ár og um 10 ár«. Næmingar á ymsum støði í musikkskúlaskipanini spældu, eins og kend og roynd fólk innan tónleik – ung sum eldri – framførdu.

Røðarar fingu 10 min. hvør at siga sína hugsan og at geva síni boð uppá tað, ið yvirskriftin legði upp til. Politikarar og onnur nýttu høvi at minnast aftur á, men ikki minst koma við góðum ráðum og boðum. Bindiklubbamentan, føroyskur dansur, tónleikur og annað kom upp at venda, men eitt, ið ofta kom fram, var tørvurin á mentanarhúsi.

Røðarar vóru Elin Nielsen, Ulf Nordlund, Søren Bruun, Ole V. Laursen, Kirsten Strøm Bech, Olavus Jespersen, Karin Brattaberg, Johan Dahl og John Johannesen.

